# Sjúrður saknar mótar-gument

Sjúrður Skaale, tingmaður fyri Tjóðveldi, sigur við Rás2, at hann saknar ofta mótargumentini í politiska



**25**

kjakinum.

Tað er í sambandi við uppskotið at skerja tingmannatalið, sum fekk lítla undirtøku í Tinginum í síðstu viku.

- Tað er soleiðis í politiskum kjaki, at tann, sum vil broyta okkurt skal grundgeva væl og virðiliga fyri, hví tað er rætt, og hvussu alt fer at síggja út, verður uppskotið samtykt. Tann, sum vil varðveita tað, sum er, sleppur undan at argumentera,



## Er 33 rætta talið?

tí tað verður góðtikið, at støðan er, sum hon er, sigur Sjúrður Skaale og sipar til, at eingin hevur sagt, hví tað er rætt, at tingmannatalið er 33.



*– Gleðist um, at bretar á ferðavinnustevnuni Destinations í London sýndu stóran áhuga fyri at ferðast til Føroya. Á Midatlantic stevnini í Reykjavík fríggjadagin var túrurin komin til amerikanskar túroperatørar - havi ongantíð upplivað so stóran áhuga millum teirra fyrr. Stórt spell, at almennu Føroyar mest sum hava niðurlagt Feðraráðsfunktiónina, og annars halda fram at vaksa um avgjøldini á ferðing til og frá Føroyum.*

*Soleiðis skrivar Magni Arge á Facebook*



## Borgarstjórar hitta Anniku

Í morgin skipar Føroya Kommunufelag fyri fundi at umrøða ætlaðu broytingarnar í kommunubygnaðinum, har Annika Olsen ætlar, at vit skulu hava níggju kommunur. Fundurin verður á Hotel Hafnia klokkan 10 til 12.

# Skulu brúka eitt prosent til listina

**LIST Í Eystur Kommunu hevur kommunustýrið tikið tað óvanliga stigið, at hvørja ferð tey byggja út, skal eitt prosent av íløgukostnaðinum brúkast til list fyri at prýða um**

*Áki Bertholdsen*

Í Eystur Kommunu hevur kommunustýrið tikið tað óvanliga stigið, at hvørja ferð, tey byggja út, skal eitt prosent av íløgukostnaðinum brúkast til list fyri at prýða um.

Tað er eitt uppskot, sum er viðgjørt á fundi í komunustýrinum í Eystur Kommunu og tað varð einmælt samtykt.

Hetta er rættiliga óvanligt, men Jóhan Christiansen, borgarstjóri, heldur, at tað er ikki annað enn sjálvsagt, at tey eisini hugsað um, at okkurt eisini skal vera fyri eygað og sinn og sál, tá ið kommunan ger eina íløgu.

Fyrstu ferð, hendan samtyktin kemur til sín rætt, er, nú skúlin í Gøtu er bygdur út og umvældur.

- Í tí sambandi settu vit okkum í sambandi við Inger Smærup Sørensen, listfrøðing, sum síðani var og hugdi at skúlanum og gav okkum eitt uppskot um, hvussu skúlin kundi listprýðast og, hvørt listafólk, kundi verið hóskandi at heitt á.

Úrslitið er, at listamaðurin, Tummas Jákup Thomsen, sum er gøtumaður, men býr í Danmark, er í uppskoti til at prýða skúlan við list fyri einar 120.000 krónur, men enn er ongin avgerð tikin.

Nú skal skúlin í Leirvík somuleiðis byggjast út og tí sambandinum er eisini ætlanin at heita á sama listafrøðing um at geva kommunustýrinum uppskot um, hvussu hann kann prýðast við list.

Men Jóhan Christiansen sigur, at tað kann eisini verða talan um at prýða aðra bygging hjá kommununi við list eftir sama leisti, eitt nú bátahyl og annað.



*Tummas Jákup Thomsen, listamaður, fær kanska heiðurin at prýða Gøtu Skúla við list. Myndin er av vangamynd hansara á Facebook*

# Tann góði leiðarin

**LEIÐSLA Ivast tú í, hvussu tú skalt nýta tína orku í leiðarastarvinum? Nýggj kanning hevur funnið 10 eginleikar, sum eyðkenna tann góða leiðaran.**




*Steven Gerrard er dømi um eina góða fyrimynd*

*Finnur Sivertsen, búskaparfr.*

Øll ynskja vit okkum ein góðan og dugnaligan leiðara. Men hvat merkir hetta í gerandisdegnum? Og hvussu kanst tú sjálvur gerast tann leiðarin, sum verður ein fyrimynd hjá starvsfólkunum? Nýggj kanning hevur funnið 10 eyðkenni hjá tí góða leiðaranum.

Leiðarin gevur sínum starvsfólkum nýggjar og spennandi uppgávur og mennir tey áhaldandi við skeiðum og eftirútbúgvingum.

Leiðarin lurtar eftir sínum starvsfólkum og ger brúk av teirra førleikum, tá hansara egnu evni ikki strekkja til. Starvsfólkini fáa ábyrgd og verða við til at taka avgerðir, ikki minst tá um nýhugsan ræður.

Tiltøk verða sett í verk til tess at betra um trivnaðin og at royna nýggjar arbeiðshættir. Keðiligir fundir fáa nýggj heiti, sum t. d. eitt kaffikjak, har øll fegin vilja luttaka.

Leiðarin heldur vakið eygað við tí einstaka starvsfólkinum og evnar at síggja, hvussu ymisk tey eru fyri, fakliga eins væl og menniskjaliga. Teimum sum ikki trívast, bjóðar hann nýggjar avbjóðingar og førleikar, so tey kunnu fáa ein arbeiðsdag, ið gevur innihald.

Leiðarin er slóðarin, ið gongur undan, og ongin í fyritøkuni má ivast í, hvaðar leiðin ber. Broytir leiðarin kós ella mannagongdir, mugu hesar broytingar verða samskiftar so væl út í hvønn krók í fyritøkuni, at ongin ivast í nýggju settu kósini.

Leiðarin gongur á odda á øllum hermótum. Hann veit nágreiniliga, hvat hann vil og torir at taka avgerðir og at skera ígjøgnum. Hann nær tey mál, hann hevur sett sær.

Leiðarin megnar at skapa íðni og áhuga um arbeiðsuppgávurnar og eggjar sínum starvsfólkum at gera sítt besta og at hugsa nýskapandi.

Leiðarin bjóðar starvsfólkunum at koma við uppskotum til nýggjar hættir at loysa uppgávurnar. Hann er opin fyri broytingum og nýggjum hugskotum.

Leiðarin megnar at umseta avgerðir á stjórnarskrivstovuni til eitt mál, ið øll starvsfólkini skilja.

Leiðarin í tí almenna sær borgarar sum viðskiftafólk, hvørs ynski og tørvir standa oman fyri alt annað. Hetta smittar av upp á almennu starvsfólkini, sum fáa eina jaliga tilgongd til borgararnar.

*Business-line, www.bl.fo*